LM-016/2023

Fylgiskjal 14

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

**Løgmálaráðið**
**Gongin 7**
**Postrúm 64**
**FO- 110 Tórshavn**

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 14.07.2023
J. nr. (MEGD): 701-6-2023
Ummælistíð: 08.06.2023 til 17.07.2023
J. nr. (LMR): 21/15422

Hoyringarskriv viðvíkjandi
**Uppskoti til løgtingslóg**
**um broyting í lovbekendtgørelse om Straffeloven (Revsilógin)**
(*Broytingar í revsilógini kap. 1-11*)

MEGD vil takka fyri høvið at senda hoyringarskriv viðvíkjandi nevnda uppskoti.

1. MEGD fegnast um, at hoyringartíðin var meiri enn 5 vikur, umframt at ein hoyringarfundur varð skipaður, har limafeløg kundu luttaka, um tey høvdu áhuga. Limafeløg og meginfelag høvdu av hesum orsøkum munandi betri fortreytir at gera neyðugar kanningar og umrøða uppskotið. Samstundis verður víst á, at nøkur limafeløg hjá MEGD vóru í summarfrí í ummælistíðini, og tískil fingu tey ikki ummælt uppskotið. Vísandi til altjóða brekrættindasáttmálan,[1] hevur MEGD fylgjandi viðmerkingar.

2. MEGD mælir til, at revsirættarráðið, og onnur viðkomandi ráð og nevndir, verða mannað við minst einum umboði, ið hevur serkunnleika til bæði brekviðurskifti og revsirætt.

3. MEGD mælir til at viðkomandi fyriskipanir ella tilboð sambært revsilógini, eitt nú samfelagstænasta, útslúsing og útbúgvingar, hava møguleika fyri at verða tillagað á hóskandi hátt, soleiðis at javnbjóðis atkoma kann bjóðast til øll, uttan mun til brek ella varandi sjúku.

[1] Uppskot til samtyktar um at seta í gildi fyri Føroyar Sáttmála Sameindu Tjóða frá 13. desember 2006 um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. LM-162/2008.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

4. Um farið verður undir at tilevna eina føroyska revsilóg, ynskir MEGD at bæði limafeløg og MEGD aftur verða tikin upp á ráð við góðum skotsbrái – t.d. við 5-6 vikum – og at hoyringarfundur verður skipaður.

5. Víst verður til grein 16 í uppskotinum, har hugtøk verða brúk sum 'sinnissjúka', 'munandi menningartarn', 'fyribils sinnisjúka', 'í gerningsløtuni vórðu menningartarnaðir' og persónar, sum vóru í einari støðu 'sum fult og heilt kann javnmetast við menningartarn'.
MEGD vil í hesum høpi gera vart við, at málburður og orðfeingi hava grundleggjandi týdning fyri almenna hugburðin til hugtøk sum *brek* og *varandi* sjúkur. Nevndu hugtøk verða ikki vanliga brúkt, og tykjast tí at verða brúkt av revsirættar*tekniskum* ella brots*tekniskum* orsøkum. Um fólk, ið bera brek, verða revsað, er dómur teirra sostatt í øllum førum í ávísan mun tengdur at tekniskum metingum. Royndir vísa, at teknisku metingarnar kunnu vera samansettar, og eitt nú taka støði í bæði lívfrøði, heilsufrøði, fólkalívsfrøði, etikki, løgfrøðiligum fordømum ella altjóða mannarættindalóg. MEGD vil mæla til, at metingar, ið beinleiðis eru viðkomandi fyri fólk, ið bera brek – og óbeinleiðis fyri øll fólk – verða gjørdar av serfrøðingum ella umboðum, ið hava nøktandi vitan og kunnleika til fólk, ið bera brek. Eisini hevði tað verið ein greiður fyrimunur við skipaðari gransking um eitt nú viðkomandi fakligt og alment orðaskifti (*diskurs*), hugtøk, málføri, orðfeingi o.l..

6. Í sama høpi vónar MEGD, at tað sum heild verður tryggjað – eitt nú í mun til *fakligar* ella *tekniskar* metingar hjá *Retslægerådet* – at viðkomandi partar hava virðing fyri, at føroyska revsirættarøkið kann verða øðrvísi enn danska revsirættarøkið, og at viðkomandi atlit harav verða tikin til føroyingar, ið bera brek, ið kunnu vera verri stillaðir, eitt nú um mál, karmar ella tænastur eru í Danmark ella á donskum máli.

7. Vísandi til stykki 5, vil MEGD mæla til, at ein almenn løgfrøðilig orðabók- ella listi verður skipaður í Føroyum. Løgfrøðiliga orðabókin ella listin hevði styrkt grundarlagið undir øllum løgfrøðiligum arbeiði í Føroyum, og hevði eitt nú verið eitt viðkomandi amboð hjá starvsfólkum, bæði fyri innan og fyri uttan almenna geiran. Í verandi løtu er eingin slík almenn løgfrøðilig orðabók- ella listi, og MEGD metir tí, at tað er vandi fyri, at eitt nú ymiskar lógir, hóast tær taka støði í ítøkiliga somu evnum, brúka ymisk løgfrøðilig hugtøk. Um innihaldið í føroyskari lóggávu ikki verður samskipað og samansjóðað á nøktandi hátt, er rættartrygdin hjá fólki í vanda, umframt at rættarliga grundarlagið og samskipanin millum viðkomandi partar verður tyngri, enn neyðugt.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

LM-016/2023

8. Royndir vísa, at tey háttaløg, ið verða brúkt til at diagnostisera brek ella varandi sjúkur í ávísan mun taka støði í fortreytum, vitan og kunnleika um mannfólk. Harav eru fortreytir, vitan og kunnleiki um kvinnur undirumboða og avmarkað í mun til diagnostisering. Ein grundleggjandi partur av revsilógini byggir á tekniska vitan um støðuna hjá fólki, harundir um tey bera brek ella hava eina sjúku. Hetta bendir á, at øktur vandi er fyri, at kvinnur, ið bera brek, kunnu vera fyri mismuni og tí fáa eina órímuliga harða revsing. MEGD metir, at hetta er ein sera álvarsamur trupulleiki, ið kann føra til mannarættindabrot. Loysnir mugu finnast sum skjótast, soleiðis at rættartrygdin hjá kvinnum, ið bera brek, ikki er veikari, enn rættartrygdin hjá mannfólki.

9. Við støði í altjóða brekrættindasáttmálanum, eiga viðkomandi starvsfólk at verða endurútbúgvin ella førleikament soleiðis at tey hava nøktandi vitan um brekviðurskifti og førleikar at samskifta við fólk, ið bera brek.

10. Feløg, ið umboða áugamálini hjá fólki, ið bera brek, eiga at hava góða atkomu til vitan um viðkomandi revsirættarmál og rættarpraksis. Í hesum høpi er serliga umráðandi at tryggja at samskiftið er nøktandi, eitt nú við fólk, ið eru blind ella deyv, fólk við niðursettari hoyrn, fólk við menningartarni, lesi- og skriviveik, fólk, ið hava demens og fólk, ið hava sálarsjúku. Eisini eigur hædd at verða tikin til aldur, kyn, landafrøði, etniskan uppruna. Viðkomandi keldur kunnu eitt nú vera leitigrunnar, netportalar, almenn álit, Ugeskrift for Retsvæsen, Karnov og heimasíður.

11. MEGD vil eisini gera vart við, at til tess at tryggja, at mismunur ikki verður framdur grundaður á breki ella varandi sjúku, er alneyðugt at hava eitt dygdargott og væl skipað eftirlit við revsirættarligum viðurskiftum. Tí er neyðugt at fáa ment eitt óheft og uttanveltað eftirlit sambært greinum 33, stykkjum 1-3, í altjóða brekrættindasáttmálanum. Her er neyðugt at hava í huga tey feløg, ið umboða áhugamálini hjá fólki, ið bera brek ella hava varandi sjúkur.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

12. Til tess at verja og fremja rættindi hjá fólki, ið bera brek, er harumframt grundleggjandi treyti við skipaðari hagtalsinnsavning hvørs endamál er at skráseta, kanna og granska í, í hvønn mun fólk, orsaka av breki ella varandi sjúku, eru fyri missmuni í mun til onnur, ið fáa revsing. Víst verður tískil til altjóða brekrættindasáttmálan,[2] grein 31, ið staðfestir so ljóðandi:

> ***Hagtals- og dátuinnsavning***
>
> ***Stykki 1***
>
> *Limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, eisini hagtals- og granskingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið seta henda sáttmála í verk. Tá ið hesar upplýsingar verða savnaðar og dagførdar, skal:*
>
> *a) verða tryggjað, at virkað verður eftir lógini, eisini lóggávuni um dátuverju, til tess at tryggja, at tagnarskylda verður hildin, og at privatlivið hjá fólki, ið bera brek, verður virt;*
>
> *b) verða tryggjað, at virkað verður eftir altjóða góðtiknum mannagongdum, tá ið hagtøl verða savnað og nýtt, til tess at verja mannarættindi og grundleggjandi frælsi og etiskar grundreglur.*
>
> ***Stykki 2***
>
> *Upplýsingarnar, sum verða savnaðar sambært hesari grein, skulu verða skildar sundur eftir tørvi og nýttar til at hjálpa limalondunum at meta um, hvussu teimum gongst við at seta tær skyldur, ið tey hava eftir hesum sáttmála, í gildi í innlendis lóggávu og til at eyðmerkja og fara undir tær fordingarnar, sum fólk, ið bera brek, renna seg í, tá ið tey brúka rættindi sín.*
>
> ***Stykki 3***
>
> *Limalondini skulu taka á seg ábyrgdina av at breiða hesi hagtøl út og tryggja, at fólk, ið bera brek, og onnur sleppa fram at teimum.*

Vinaliga vegna MEGD,

Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari

[2] Sama kelda sum í fótnotu 1.



MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

LM-016/2023